

*Fýra kvinnur og tveir menn gjørdu sítt til saman við húsaorkestrinum at nýggjárskonsertin í Klaksvík livdi upp til sítt heiti*

# Nýggjárstónar í Atlantis

**Hóskvøldið í seinastu viku var ein nýggjárskonsert í Atlantis í Klaksvík. Ingibjørg, Mása, Karl Martin, Pætur, Steinvør og Arnfríð serveraðu ein vælblandaðan cocktail við bæði festligum, stillum, blues og upp poppaðum klassiskum sangum**



*Steinvør Fonn var vælupploegd hetta kvøldið, og hon má sigast at hava eina fantastiska góða rødd. Hon útstrálar eisini ein alsk til tónleikin, sum lýsir av henni, tá hon stendur á palli*

KONSERT

*Myndir: Bárður Lydersen*
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Jólakonsertin í Christianskirkjuni hevur í mong ár verið startskotið til jólini. Ikki hava klaksvíkingar gjørt so nógv burtur úr nýggjárinum framman undan sjálvum gamla árs kvøldi, men í ár var nýggjárskonsert hildin í Atlantis. Tað var ein frálík konsert, har fleiri kend nøvn framførdu festligar, stillar og nýggjárs sangir. Alt gekk upp í eina hægri eind, og tað var veruliga nýggjársstemningur í mentanarhúsinum hesar tveir tímarnar konsertin vardi. Einstaklingar og bólkar framførdu saman við einum væl uppløgdum húsaorkestri. Vertur var Gunnar Nolsøe.

Teknikkurin argaði tó nakrar ferðir í gjøgnum konsertina. Av eini ella aðrari orsøk var tað í heilum, at mikrofonir ikki virkaðu, sum tær skuldu, tá tónleikararnir tóku tær. So hoyrdist øll ljóðføri hjá húsaorkestrinum ikki og ymiskt annað við. Hetta ørkymlaði óneyðuga nógv og gjørdi sítt til, at nakað langt var millum framførslurnar av og á. Fólkið í salinum tóktiskt tó ikki at nervast so nógv av tí, men fleiri høvdu hug at flenna til tíðir og ristu við høvdinum sum hvør skal siga: Hatta er bara typiskt teknikkur.

Men teknikkurin var eisini tað einasta, sum argaði hetta kvøldið. Og tá alt riggaði, sum tað skuldi, fingu áhoyrararnir eina framúr góða og hugnaliga konsert.

### Kvinnurøddir

Trettan ára gamla Ingibjørg Hansen úr Mikladali byrjaði konsertina. Tað er við at vera hennara lutur eftirhondini. Hon byrjaði eisini jólakonsertina í Christianskirkjuni, og tað letur ikki til at nerva ungu gentuna yvirhøvur, at hon er tann fyrsta á pallin.

Púra rólig og brosandi stóð hon á pallinum og bíðaði, til alt var tilreiðar, og hon kundi byrja at syngja lagið Crazy hjá Patsy Kline. Hetta er tað lagið, sum hon vann Nósabarnaprixið við. Hennara tulking av hesum klassikaranum er sera góð, og røddin hjá Ingibjørg má sigast at vera sum skapt til hetta lagið. Eftirhondini munnu tað vera mong, ið hava hoyrt Ingibjørg syngja hetta lagið, so tað var ein fragd at hoyra hana framføra kenda lagið Blue Bayou.

Aftan á Ingibjørg kom Mása Tróndheim, sum vann Ársins Songrødd fyri tveimum árum síðani. Mása hevur eina blueskenda rødd, sum á ein ella annan hátt bara fær fólk at kenna seg væl, meðan hon syngur. Mása sang tríggjar sangir, Diamond Ring, Winter´s Tale og Fields of Gold.

Á konsertini sungu Steinvør Fonn, Unnur Fonn, Erla Petersen, Súsanna Sivertsen og Tóra við Keldu eisini. Steinvør greiddi frá, at tær fimm plaga at syngja saman av og á – umframt at allar eru í kvinnukórinum Suð. Fyrst sang Steinvør Christmas Song. Síðani sungu tær eina sirpu við I´ll be home for Christmas, Hallelujah úr Messias og so Down by the Riverside.

Arnfríð Lützen sang tveir sangir. Tann fyrri var Once upon december og hin Leave a light on for me hjá Belindu Carisle. Til tann seinna fekk hon tríggjar afturat sær at syngja kór.

### Eivør yvirraskaði

Karl Martin Samuelsen, sum nú hevur staðið á palli í 30 ár, luttók eisini á konsertini, og hann sang Love will keep us alive, Make up your mind og My one true love. Umframt at syngja dugir Karl Martin eisini sera væl at undirhalda. Tá hann var klárur at syngja, segði hann, at hann líka mátti hava sín førarahund. Síðani bríkslaði hann eftir honum, og upp úr skjúrtulummanum tók hann so brillurnar. Hetta við at Karl Martin er komin nakað longri upp í árini enn hinir luttakararnir á konsertini gekk so aftur í hansara viðmerkingum fleirir ferðir millum sangirnar.

Pætur við Keldu byrjaði við at syngja ein sang, sum honum dámar avbera væl. What a wonderful world. Síðani fekk hann óvæntaða vitjan á pallin. Beddi við mandolin, Tóra systirin at syngja kór og Eivør Pálsdóttir. Saman sungu tey Beautiful star of Bethlehem og Field of Gold. Eivør var ógvuliga avslappað, berføtt sum vanligt í einum reyðum kjóla og hárið hekk púra leyst niður. Framførslan hjá teimum var sum væntað góð, og enn einaferð varð staðfest, at Eivør og Pætur supplera væl hvønnannan.

Nýggjárskonsertin í Atlantis endaði við, at allir sangararnir sungu kenda nýggjárssangin hjá ABBA, Happy new year. Kvinnurnar sungu versini, meðan øll sungu niðurlagið. Ein stak góð konsert var komin at enda. Men tó vildu teir um 100 áhoyrararnir hava eitt eykalag. So enn einaferð trinu Eivør og Pætur á pallin, áðrenn konsertin var liðug, og fólk kundu fara út aftur í illveðri, sum leikaði í uttanfyri.